# Tiltøk

**Andakt**
Sunnudagin 15. aug. kl. 10
Andakt á Norðoya Sjúkrahúsi: Magnus Brahé Jørgensen.
Sunnudagin 15. aug. kl. 14.30
Andakt á Norðoya Røktarheimi: Magnus Brahé Jørgensen.

**Sunnudagin 15. august**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen, altarg., skriftamál kl. 10.40. Talvan gongur fyri KFUM í Havn
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Heri Joensen
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Sonja Klein. Talvan gongur fyri KFUM í Havn
**Kirkjubøar kirkja:** kl. 11
Derhard Jógvansson, altarg.
**Nólsoy:** kl. 12
Sverri Steinhólm
**Norðskála:** kl. 11
Emil Olsen, messa
**Gøta:** kl. 11
Martin R. Jacobsen
**Sjóvar kirkja:** kl. 11
Jógvan Fríðriksson og Símun P Jacobsen altarg. Ámundur Berthelsen verður heiraður fyri trúfasta urgutænastu
**Christianskirkjan:** kl. 11
Marjun Lómaklett. Talvan gongur fyri sunnudagsskúlan hjá heimamissióníni
**Haraldsund:** kl. 12
Magnus Brahé Jørgensen
**Tvøroyri:** kl. 11
Jónsvein Bech.
**Sandvík:** kl. 18
Jónsvein Bech
**Vestmanna:** kl. 11
Theodor E. D. Olsen
**Húsavík:** kl. 12
Jákup R. Hansen
**Bøur:**
Inga Poulsen Dam

**Katólska kirkjan**
Hvønn gerandisdag kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit.
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Jerzy Kruk, prestur í Mariukirkjuni.

**Tórshavnar Hvítusunnu-samkoman yviri við Strond**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18. Øll eru vælkomin

**Matiné í Havnar kirkju**
Leygardagin kl. 11.30.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl. 11 familju- og morgunmøti við sunnudagsskúla.
Mánakvøldið kl. 20 lovsangs- og bønarløta. www.gospel.fo

**Argir, Kirkju- og missiónshúsið**
Sunnukvøldið kl. 18
Møti v/Derhard Jógvanson

**Missiónshúsinum við Landavegin**
Sunnukvøldið møti kl. 18 v/Egil Joensen

**Gongutúrur**
Sunnudagin verður gongu-túrur: Stiðjafall – Velbastað (gomul oyggjagøta). Hetta er er lættur – miðal túrur. Farið verður frá Kunningarstovuni kl. 10. Havið heit og góð gonguklæðir og ein heitan drekkamunn og matpakka við. Tilmelding á tlf. 302425 ella torsinfo@torshavn.fo

**Fríkirkjan Oasan, Kirkjustræt**
Sunnudagin kl. 11
Guðstænasta v/ Heðin Lamhauge
Mánakvøldið kl. 20
Bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin. www.oasan.fo

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 16. august kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman byrjar aftur eftir summarferiuna.

**Samkoman Marknagil Fjalsgøta 2, Tórshavn**
Sunnudagin kl. 10.30
Breyðbróting.
Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/uppbyggingarmøti.
Øll eru hjartaliga vælkomin

**Ebenezer**
Leygarkvøldið kl. 20
Ungdómsmøti.
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Rodmundur í Liða talar. Barnaansing er meðan møti er. Kl. 18 Evangeliskt-møti. Greitt verður frá trúboð-anartúrinum í Asia, eisini verður vitnisburðar og sangur á møtinum. www.ebenezer.fo

**Frelsunarherurin Tórshavn**
*Tórsgøta 19*
Leygarkvøldið kl. 19 útimøti í Nólsoy
Sunnukvøldið kl. 18 Møti

**Filadelfia Tórshavn**
Leygarkvøldið kl. 21 Flare
Sunnudagin kl. 11
Morgunmøti v/Birgitte og Søren Petersen trúboðarar í Kenya. www.filadelfia.fo

**Sandoy**
Sangferðin heldur fram til 15. august kring oyggjarnar. Kunnað verður somuleiðis um eina ætlan at útvega pening til góðgerandi endamál í Føroyum og uttanlanda.

**Missiónshúsið í Skopun**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/Molly Jacobsen. Øll eru hjartaliga vælkomin. Missiónshúsið í Skopun
Mikukvøldið kl. 19.30 bønarløta. Kl. 20 bíbliutími Gal. 1,11-24, v/Jacob Hendrik Hansen. Øll eru vælkomin.

**Kedron, Vágar**
Møtir og tiltøk hjá samkom-uni eru at síggja á heimasíðu okkara www.kedron.fo. Øll eru vælkomin í KEDRON. Hevur tú ikki hendan møguleikan, kunna tygum ogna tygum KEDRON-tíðindi.

**Missiónshúsið Libanon í Sørvági**
Sunnudagin kl. 17 verður møti í missiónshúsinum. Heimligar kreftir luttaka. Øll eru hjartaliga vælkomin. www.libanon.fo

**Eysturoyar Gongufelag**
Gongutúrur
sunnudagin 15. aug.
Rituvík - Gásafelli - Nev
Vit møtast við Skúlan kl. 14
Túrurin er lættur. Nevndin.
Suðuroyar-túrur
27.–29. august
Gist verður í Øravík. Tilmelding við at gjalda kr. 300 (depositum)á konto 9865-1033381. Viðmerki endiliga "NAVN ella HÚSKINR: Meira fæst at vita á www. eystgong.net ella tlf. 775100, 234214 og 507529. Tilmeldingarfreist 15. august.

**Keldan, Skálafirði**
Leygarkvøldið kl. 21, Awake við Høgna Johannesen.
Sunnudagin kl. 11,
Morgunmøti við Jastrid og Paula Høj. Sangluttøka við Eyðun Jacobsen.
Vælkomin í Kelduna
www.keldan.fo

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Leygarkvøldið kl. 21
Felagsundómsmøti í Fugla-firði, Bilar koyra av Glyvrum
Sunnukvøldið kl. 18
Møti v/Ragnar Hansen og Høgni við Rætt.
Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091

**Karmel á Eiði**
Møti verður 15. august kl. 19 í. Talari er Justinus Poulsen

**Leirvík**
Ovin Klein Olsen framførir sangir og greiðir frá lívi sínum mikudag 11. august: Leirvíkar Missiónshús Kl. 19.30. Sangferðin heldur fram til 15. august kring oyggjarnar. Kunnað verður somuleiðis um eina ætlan at útvega pening til góðgerandi endamál í Føroyum og uttanlanda.

**Getsemane, Stangaskákið 1 Klaksvík**
Sunnukvøldið kl. 18
Møti v/elstunum
Mánakvøldið kl. 20
Bønarmøti v/breyðbróting

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti við Jóhannes Miðskarð. Innsavnan til útimissión. Drekkamuður verður aftaná. Kl. 21 Ungdómsmøti

**Suðuroy**
Ovin Klein Olsen framførir sangir og greiðir frá lívi sínum mikudag á hesum støðum: Leygardag 14. august: Meinigheitshúsið í Vági Kl. 19 og sunnudag 15. august: Missiónshúsið á Tvøroyri Kl. 18. Kunnað verður somuleiðis um eina ætlan at útvega pening til góðgerandi endamál í Føroyum og uttanlanda.

**Aglow Suðuroy**
Byrjað verður aftur eftir summarsteðgin í seinnu helvt av august.

**Frelsunarherurin Vágur**
Sunnukvøldið kl 18 evang. møti V/ Solberg og fleiri.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*Tlf: 316491/286491*
*tilhald@torshavn.fo*
Tilhaldið er afturlatið frá Opið kl. 9-17 mána- til hós-dag og fríggjadag kl. 9 -16
Í viku 33 (alla vikuna) hava vit vitjan av Thue og Karin Cristiansen. Tey fara at virka ymiskt forvitnisligt handverk á veghæddini í Tilhaldinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldi-num - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

## Brúdleyp

Leygardagin 14. august giftast í Betesda, Mogens Fríði Petersen og Gunvør Poulsen. Vígslan verður kl. 13, og móttøka aftaná. Øll eru hjartaliga vælkomin. Um kvøldið verður døgurði fyri innbodnum.

Leygardagin 14. august kl. 12 giftast Signar Djurhuus, Kollafjørður og Jana Jacobsen, Kaldbak, í Kollafjarðar kirkju. Døgurði verður fyri innbodnum. Vælkomst verður í heiminum hjá Signar og Janu í Líðini 67. Frá kl. 19. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Leygardagin 14. august giftast Evi Tausen og Gudmundur Djurhuus, Porkeri. Vígslan verður kl. 15 í Porkeris skúla. Veitslan verður fyri innboðnum í Porkeris skúla kl. 18.

Leygardagin 14. august giftast Lív Johannesen, Lamba og Jákup Justinussen, Leirvík. Vígslan verður kl. 12 í Gøtu kirkju. Veitslan verður hildin fyri innbodnum kl. 18 í Nesvík.

Leygardagin 14. august kl. 12 giftast á Kirkju (Fugloy) Liljan Jakobsen, Skopun og Jóanis Christiansen, Klaksvík. Veistlan verður kl. 19 í bygdarhúsinum í Leirvík.

# Tiltøk




**Góði Hermann**
Hjartaliga tillukku við tí stóra runda degnum í dag. Spell at tú ikki fekst morgunsangin við á altanuni :( Takka fyri gott vinarlag.
**Heilsan vit undir Nesinum 6**



Í dag fylla hesir báðir stavnarnir ár. Ein ikki minni kendur, Fidel Castro, fyllir eisini hendan dagin, men hann orkaði ikki at ganga niðan á Múlan til myndatøku. Vit í Prestmonnum ynskja tykkum tillukku við degnum. Vónandi fáa vit nógvar góðar fjallatúrar saman í framtíðini.



Vit ynskja hjartaliga takka øllum, ið vóru við til at gera okkara hjúnabandsdag tann 15.08.2009 so góðan og minnisríkan. Stóra takk fyri gávur, heilsanir og til tykkum, ið hjálpti okkum á ymiskan hátt.
Asante sana na Mungu awabariki.
**Mia og James**



Hjartaliga takka vit tykkum, ið vóru við til at gera hjúna-bandsdag okkara tann 01.08.2009 so góðan og minnis-ríkan. Stóra takk fyri gávur, heilsanir og til tykkum, ið hjálptu okkum á ymiskan hátt.
**Maria og Høgni**




Hjartaliga takka vit øllum sum gleddi okkum á silvurbrúd-leypsdegnum t.22.06.10. Hjartans takk fyri sangin heima og ikki minst takk fyri teir rørandu sangir til veitsluna í Øravík. Takk til tykkum øll sum hjálptu so væl til á ymiskan hátt, og so hjartans takk til tykkum mongu sum komu at hátíðarhalda dagin við okkum, og gjørdi hann ógloymandi. Harrin signi tykkum øll.
**Heilsan**
**Bodil og Eliesar Finnsson**